Endiliga eydnaðist tað

Tá ið Frem mikukvøldið fyri fyrstu ferð í hesum kappingarárinum vann á heimavølli, vóru allir tríggir føroyingarnir á vøllinum alla tíðina

DANMARK 1. DEILD
Jóannes Hansen

Mikukvøldið eydnaðist tað Frem fyri fyrstu ferð í hesum kappingarárinum at vinna á heimavølli. Frem spældi móti Herfølge, og úrslitið var 1-0, sum eisini var støðan í steðginum. Talan var um útsetta uppgerð. Dysturin varð útsettur, tí Jón Rói Jacobsen og Gunnar Nielsen vóru við føroyska landsliðnum í Ísrael.

Sigurin ber við sær, at Frem fekk luft í botninum. Í vikuskiftinum skulu teir spæla á útivølli móti Skjold og Atla Gregersen.

Á sama hátt sum síðsta sunnudag so vóru allir tríggir føroysku spælararnir í Frem á liðnum mikukvøldið. Jón Rói Jacobsen var í miðverjuni, Jónas Þór Næs var vongverji í høgru, og Gunnar Nielsen var málverji.

Síðstu løtuna var trýstið stórt á Frem málið, men Gunnar Nielsen megnaði at halda tætt. At avrikið hjá honum aftur hesa ferð var sannførandi man ivaleyst bera við sær, at tað ikki verður heilt so av sær sjálvum, sum tað annars hevur verið roknað við, at veteranurin Jørgen Nielsen skal vinna plássið aftur, tá ið hann verður komin fyri seg eftir skaðan, sum hann hevur verið plágaður av síðstu vikurnar.

GÍ fer ikki at dumpa

Sandoyingar høvdu bóltin nógv, men teir vóru ikki nóg avgjørdir, tá ið GÍ hevði deyðbóltsstøður

ENDASPÆL
Jóannes Hansen

Tað var gott lag á mongu GÍ viðhaldsfólkunum, tá ið tey í fína heystarveðrinum mikukvøldið um seks tíðina fóru úr Sarpugerði. GÍ hevði vunnið 3-0 á B71, og harvið talar alt undan uppgerðini á Sandi í morgin fyri, at GÍ eftir ferðina um Skopunarfjørð fer at hava atgongumerkini til bestu deildina til hús við sær aftur.

Úti á vøllinum var munurin ikki eyðsýndur. B71, sum hevði fitt av áskoðarum við sær, dugdi væl at umsita bóltin, og í løtum fleyt samanspælið hjá teimum betri, enn tað gjørdi hjá heimaliðnum. Serliga í løtum í 1. hálvleiki tóktist tað sum um, at tað var fjáltur á fleiri GÍ spælarum. Uppstillingin minti ofta meiri um 4-5-1 enn um 4-3-3, og tá ið Popczynski sum sentrali álopsspælarin ofta leitaði aftur á vøllin fyri at taka ábyrgd í álopsmyndingini, var broddurin ofta lítil.

B71 var í 3-5-2 útgangsstøðu. Tummas Pauli Olsen, Símin Hansen og Clayton Soares tóktust vandamiklir, tá ið teir bjóðaðu av ein móti einum, men B71 gjørdist ongantíð orduliga vandamikið. Verjan við Kára Sørensen á odda hevði oftast tak á. Valdemar Nowicki var tryggur í málinum, men tað kostaði ógvuliga nógv, at sandoyingar í einstøkum førum ikki vóru nóg avgjørdir í deyðbóltsstøðum.

Í 11. minutti fekk GÍ hol á. Long frísparksframlegging úr vinstru endaði við, at Hans Jørgen Djurhuus, sum mundi vera mest eyðsýndi maðurin á heimaliðnum, setti krúllin undir bóltin, sum av nakkanum á miðvallaranum fór dygst inn við handara stólpanum.

Eftir steðgin vóru teir á heimaliðnum minni strongdir og betri skipaðir. At Magni Jarnskor varð settur á sentralt miðvallarpláss gjørdi stóran mun. Leikferðin var sjálvandi ikki so høg, sum hon var á Skála leygardagin, og tá ið Krzystof Popczynski eftir uppspæl í høgru og flatt innlegg við handara stólpan økti til 2-0, var meiri friður yvir GÍ spælinum.

Clayton Soares var tvær ella tríggjar ferðir um reppið at bróta ígjøgnum og harvið at fáa møguleika at skjóta sera týdningarmikla B71 málið á útivølli, men tað eydnaðist ikki, og harvið tykist B71 møguleikin at vera lítið realistiskur.

Níggju minuttir undan leikloki syrgdi Hanus Jacobsen, sum undan steðginum hevði verið miðvallari í høgru, og sum í 2. hálvleiki var vinstri vongverji, fyri, at tað er lættari hjá GÍ viðhaldsfólkunum at gera útferð í Sandoynna í morgin. Áslakur R. Petersen frískpark eitt sindur úr høgru varð blokerað í manngarðinum. Bólturin sigldi í boga til handara stólpan, har tað tóktist sum um, at verjan hevði tak á støðuni. Tað høvdu teir ikki, Hanus Jacobsen smekkaði til, og tað skal vilja heilt illa til hjá GÍ í morgin, um teir ikki fara at vinna rættin at halda fram í fremstu rød, har teir hava verið seinastu fjórðings øldina.

ENDASPÆL um pláss í FORMULADEILDINI

GÍ-B71 3-0 (1-0)
1-0: Hans Jørgen Djurhuus 11.
2-0: Krzystof Popczynski 50.
3-0: Hanus Jacobsen 81.
GÍ: Marcin Dawid - Áslakur R. Petersen, Robert Rzeczycki, Kaj Ennigarð, Poul Henning Jacobsen (Magni Jarnskor, 46.) - Sverri Jacobsen (Jónreid Dalheim, 89.), Sámal Joensen, Hans Jørgen Djurhuus, (Poul Andreas Jacobsen, 89.) - Hanus Jacobsen, Krzysztof Popczynski, Símun Louis Jacobsen
Gult kort: Símun Louis Jacobsen
B71: Waldemar Nowicki - Bergleif Sólsker, Kári Sørensen, Hanus Clementsen - Sverrir Kjærbo, Eirikur Poulsen, Clayton Soares, Eli Hentze, Magnus Olsen, Símin Hansen, Tummas Pauli Olsen
Gult kort: Símin Hansen, Clayton Soares, Eirkur Poulsen

Alt er framvegis opið

Næstbestu klaksvíkingarnir vunnu teprran sigur á næstbestu B36 monnunum, men tað kann fara at vísa seg at verða kostnaðarmikið, at KÍ í evstu løtu gjørdi sjálvmál

ENDASPÆL UM PLÁSS Í 2. DEILD
Jóannes Hansen

Um tað verður KÍ, ella um tað verður B36, sum skal eiga síðsta plássið í næstbestu deildini, verður avgjørt í Gundadali í morgin. KÍ vann mikukvøldið 2-1 á heimavølli, eftir at tað í steðginum hevði verið málleyst. Harvið er alt púra opið undan seinnu uppgerðini.

Erling Fles skoraði bæði KÍ málini. Fyrrapartin av kappingarárinum var hann á besta KÍ liðnum, men tíðliga í summar varð hann skaddur, og síðani tá hevur hann ikki verið førur fyri at venja við fullari ferð.

Mikukvøldið var venjingarstøðan hjá Erlingi nóg góð at skjóta tvey mál. Tað fyrra fekk hann, tá ið ein tími var farin, og tað seinna skoraði hann, tá ið tað restaðu átta minuttir.

Tá ið KÍ fekk seinna málið, vóru teir tíggju móti ellivu. Eitt korter restaði, tá ið Frank Joensen fyri aðru ferð sá gula kortið og harvið sá reytt.

2-0 hevði verið fín útgangsstøða í Gundadali hjá KÍ, men í evstu løtu - 2. hálvleikur var 46.30 gamal! - fekk B36 málið, sum kann fara at vísa seg at vera munurin á 2. og 3. deild. Málið skoraðu klaksvíkingar sjálvir, eftir at B36 hevði sent frískpark í KÍ brotsteigin.

KÍ-B36 2-1 (0-0)
Dómari: Petur Reinert
1-0: Erling Fles 60.
2-0: Erling Fles 82.
2-1: sjálvmál 90.
Reytt kort: Frank Joensen (tvey gul) í 75. minutti

Súni hevur vunnið fast pláss

AaB hevur rættuliga flutt seg frá botninum, meðan tað stendur illa til hjá Rógva Jacobsen og SønderjyskE

SUPERLIGAN
Jóannes Hansen

Aftur mikukvøldið, tá ið 15. umfarið var á skránni, vóru allir tríggir føroyingarnir á vøllinum, og aftur hesa ferð var Johan B. Hansen allar 90 minuttirnar á vinstra vongverja hjá Horsens. Teir høvdu vitjan av Silkeborg. Horsens hevði frammanundan ikki vunnið á heimavølli, og Silkeborg hevði ikki vunnið á útivølli!

Og fyri fimtu ferð í hesum kappingarárinum endaði tað málleyst á heimavøllinum hjá Horsens. Tað er met, men í Horsens halda teir seg ikki spæla keðiligan fótbólt. Og tað gjørdu teir ikki, tá ið teir sunnudagin taptu 1-0 í Parkini móti FCK.

Mikukvøldið vann FCK 4-1 í Haderslev móti SønderjyskE. Harvið hevur FCK í fimtan teimum fyrstu umførunum vunnið tólv ferðir og tríggjar ferðir spælt javnt. Talan er um nýtt met hjá FCK, sum økti um leiðsluna, soleiðis at hon nú er seks stig.

Rógvi Jacobsen varð settur á vøllin, tá ið tað restaðu níggju minuttir. Meðan Rógvi var á vøllinum, skoraði FCK tvey mál. SønderjyskE er nógv aftast, og góða úrtøkan hevur ikki enn víst seg, sum tað varð roknað við skuldi gerast veruleiki, tá ið Morten Bruun fyrr í heyst gjørdist venjari.

FCK leiðlsan øktist, tí Brøndby og Viborg ikki megnaðu meiri enn javnleik. Brøndby spældi 0-0 í Esbjerg, har illa kroysta heimaliðið stríddist sum fyri lívinum, og Viborg var partur av sera undirhalddandi uppgerð í Århus, har illa stadda AGF, sum framvegis er niðanfyri strikuna, vísti góðan hugburð. Úrslitið varð 3-3.

Súni Olsen var allar 90 minuttirnar á AaB liðnum, sum í Odense vann 2-0 á OB. Talan var um fínt AaB avrik, og Súni Olsen fekk gult kort, tá ið ein hálvur tími var farin. AaB framdi tríggjar útskiftingar, og tá ið Súni Olsen alla tíðina var á vøllinum man tað boða frá, at teir í Aalborg nú síggja Súna Olsen sum ein av føstu monnunum.

Hjá FCM hevur tað í Herning ikki gingið soleiðis, sum tað áður hevur gjørt. Eftir 5-0 lúsingin í Brøndby sunnudagin hevur verið tosað um, at FCM venjarin, Erik Rasmussen, skal fáa sekkin. Tað hevur hann ikki fingið, og mikukvøldið var tað ikki heilt galið, tá ið FCM á heimavølli megnaði 1-1 móti FCN. Felagið úr Farum hevur staðið seg væl, og nú eru teir á fjórða plássi.

Talvið hesa vikuna

Stefanova,A (2494) - Harikrishna,P (2673)
Essent Hoogeveen NED (2), 24.10.2005

1.d4 d5 2.c4 c6 3.e3 Rif6 4.Ric3 e6 5.Rif3 Ribd7 6.Bd3 dxc4 7.Bxc4 b5 8.Be2 Bb7 9.0-0 Be7 10.a3 a5 11.Bd2 (11.e4 var eisini ein møguleiki) 11...0-0 12.Fc2 Fb8 13.Rab1 b4 14.Ria4 c5! 15.Rixc5 Bxc5 16.dxc5 Be4 17.Bd3 b3 18.Fc3 Rixc5 (Svartur hevur telvað betur í miðspælinum og hevur eisini fyrimun) 19.Bxe4 Ricxe4 20.Fc4 a4 21.Bb4 Rc8 22.Fd4 Fc7 23.Rfc1? Fxc1+ 24.Rxc1 Rxc1+ 25.Rie1 e5 26.Fd3 Rig5 27.Fb5 h6 28.Fxe5 Rd8 29.Fa5 Rdd1 30.h4 Rige4 31.f3 Rid5 32.Fxa4? (32.fxe4 Rixb4 33.Fxb4 Rxe1+ 34.Kh2 hendan støðan tykist rættiliga jøvn) 32...Rief6! 33.Ba5 Rixe3 34.Fxb3 Ric2 35.Fb8+ Kh7 36.Ff4 Rixe1 37.Kh2

Støðumynd eftir 37.Kh2

Rixf3+! 38.Fxf3 Rh1+ 39.Kg3 Rcf1 40.Fe2 g6 Næsti leikur er Rih5+ 0-1